TALGILDU FØROYAR

Argir, 4. Mai 2018

# Uppseting og menning av tænastuportalinum í Talgildu Føroyum

## 1. Inngangur

Í samsvari við ásetingar um alment innkeyp, ynskja Talgildu Føroya, sum partur av Gjaldstovuni, hervið at heinta inn tilboð um at menna og seta upp tænastuportal til borgarar í Føroyum.

## 2. Bakgrund

Tá borgarar í dag samskifta við tænastuveitarar, t.e. almennir myndugleikar og privatar fyritøkur, fer hetta samskiftið í høvuðsheitum fram umvegis post, teldupost, telefon ella við persónligari uppmøting. Hetta krevur handaliga avgreiðslu, sum er arbeiðs- og tíðarkrevjandi fyri allar partar.

Harafturat vita borgarar ikki altíð, hvønn tey skulu venda sær til at fáa hjálp, og tað kemur meiri enn so fyri, at tey mugu lata somu upplýsingar inn á fleiri støðum. Tað kennist bæði møtimikið og tíðarkrevjandi.

Hetta er ikki góð og tíðarhóskandi tænasta fyri borgarar og er ikki skynsamt fyri tænastuveitarar.




Fyri at veita borgarum munandi betri tænastur og fyri at gagnnýta tilfeingið hjá tænastuveitarum betur, verður gongd nú sett á at fáa ein tænastuportal, har tænastur til borgarar verða samlaðar á einum stað. Borgarar skulu kunna avgreiða so nógv sjálvi sum til ber. Tey skulu kunna síggja upplýsingar um seg sjálvi og fáa kunning um viðkomandi viðurskifti.

Endamálið er, at gera ein tænastuportal har borgarin, skjótt og einfalt kann finna og brúka flestallar talgildu tænasturnar hjá almennum tænastuveitarum, og ávísum vinnuligum tænastuveitarum.

# 3. Lýsing av veitingini

Veitingarnar sum tilboðið skal umfata er býtt í tvey, 1) Menning av tænastuportalinum og 2) umsiting av menningarpallinum handan tænastuportalin.

**1. Tænastuportalurin skal m.a. fevna um:**
- Sjálvavgreiðslur
- Sýning av dátum um brúkaran, ið ein tænastuveitari liggur inni við
- Álmanakka, har tænastuveitari t.d. kann upplýsa týðandi dagfestingar fyri brúkaran (borgarin)
- Gjaldsmodul, so brúkarin kann gjalda fyri tær tænastur sum krevja gjald
- Ein almennan talgildan postkassa (Mínboks)
- Fráboðanarskipan
- Aðrar smáar skipanir (t.d. kontaktupplýsingar, konto nr.)

Uppgávurnar hjá veitaranum verða í hesum sambandi, at:
- Seta upp og skipa arkitekturin av menningarpallinum og tænastuportalinum
- Menna tænastuportalin
- Menna vevtænastur til tænastuportalin umvegis Heldina
- Menna appir til tænastuportalin
- Samstarva við tænastuveitarar og KT-veitarar um menning av vevtænastum.
- Skjalfesta tað sum verður ment.

**2. Umsiting av menningarpallinum**

Talgildu Føroyar hava valt at fingið sær menningarpall til vega til menning av tænastuportalinum. Talan er um skipanina Outsystems[1] ið er ein sokallaður low code menningarpallur. Hetta merkir at veitarin skal menna tænastuportalin í hesum amboði. Eisini skal veitarin standa fyri uppseting og umsiting av menningarpallinum í sáttmálatíðarskeiðinum.

Tað er ikki eitt krav at veitarin kennir henda pall frammanundan. Veitarin fær hinvegin neyðugu útbúgvingina, at umsita  og menna í hesum amboði frá Talgildu Føroyum.

# 4. Sáttmáli og karmar

Ein sáttmáli verður gjørdur við eitt felag ella samtak, sum skal bjóða fram 2-3 navngivnar ráðgevarar, at menna tænastuportalin og umsita menningarpallin í sáttmálatíðar-skeiðinum. Veitingin fevnir tilsamans um 64 tímar um vikuna fyri teir 2-3 ráðgevararnar. Gjaldstovan kann skerja hetta tal við upp til 20% í longri ella styttri tíðarskeið. Er tørvur á fleiri tímum enn tað avtalaða í eitt tíðarskeið, verður hetta avtalað millum partarnar. Velur Gjaldstovan, at skerja tímatalið, skal hetta fráboðast veitaranum minst 4 vikur frammanundan.

[1] Sí www.outsystems.com

Sáttmálatíðarskeiðið er 12 mánaðir, við møguleika fyri leingjan í 6 mánaðir. Væntað verður at veitarin kann byrja beint eftir at sáttmálin er undirskrivaður, sum væntandi er í byrjanini av juni 2018. Í viku 25 og viku 33 í 2018 er neyðugt at allir ráðgevararnir, sum veitarin hevur valt skulu verða partur av hesari veiting, eru tøkir fulla tíð til skeið og verkstovur.

Veitarin verður tímaløntur fyri sítt arbeiðið sambært tímaprísinum, ið veitarin bjóðar inn við.

Avtalað verður millum kunda og veitara, nær feria verður hildin.

Fyrsti partur av sáttmálatíðarskeiðinum kann væntast at fara til at seta seg inn í skipanir, ið eru viðkomandi fyri tænastuportalin, so sum menningarpall, ávísar stuðulsskipanir og talgilda samleikan.

Tað er verkætlanarleiðarin fyri tænastuportalin, ið áleggur veitaranum tær uppgávur, ið skulu fremjast og kemur veitarin í hesum sambandi at virka sum ein innanhýsis luttakari í verkætlanini. Ráðgevararnir skulu umframt at samstarva við verkætlanarleiðaran, eisini samstarva við innanhýsis verkætlanarstarvsfólk í tænastuportalinum. Talan er um KT-arkitekt, UX-persón, løgfrøðing og KT-greinara. Harafturat verður neyðugt at samstarva við teir tænastuveitarar, sum skulu knýta sínar dátur og tænastur á tænastuportalin. Arbeitt verður agilt í sprintum í tøttum samstarvi við innanhýsis verkætlanarstarvsfólkini.

Teir ráðgevar sum felagið ella samtakið, ið vinnur útboðið, setur á hesa uppgávu skulu sum útgangsstøði ikki skiftast út. Vísir tað seg, at samstarvið við veitaran, ella ávísar ráðgevar hjá veitaranum, ikki er nøktandi, tilskilar Gjaldstovan sær rætt til, at hava møguleika til at skifta ráðgevarnar út.

Kundin ger útkast til sáttmála.

## 5. Arbeiðstíð og staður

Sum útgangsstøði skulu uppgávurnar loysast á adressuni hjá kundanum í vanligari arbeiðstíð.

Møguligt skal vera at seta seg í samband við veitaran umvegis telefon og teldupost í vanligari arbeiðstíð.

## 6. Krøv til tilboðið

Tilboðið frá veitara skal fevna um fylgjandi:

- CV hjá ráðgevunum, ið boðið verður inn við, við kunning um førleikar, útbúgving og royndir frá teimum seinastu 5 árunum.
- Tímaprísur – Samsýningin fyri veitingar fevndar av hesum útboði, skal grundast á ein fastan miðal tímatakst hjá teimum ráðgevum sum veitarin bjóðar inn við.

Argir, 4. Mai 2018

**Minstukrøv:**
Teir ráðgevar, ið veitarin bjóðar inn við, skulu hava í minsta lagi 2 ára skjalprógvaðar royndir við menning.

Tað er eisini minstakrav, at veitarin bjóðar fram ráðgevar við førleikum í SQL-databasum og SQL-máli, og í grundleggjandi databasuástøði (E-R, crowfeet, normaliseringsreglum v.m.).

## 7. Vekting av tilboði

Innkomnu tilboðini verða vektað eftir: Góðsku og prísi.

| Krav | Vekt | Frágreiðing |
|---|---|---|
| **Góðska:** | 50% | |
| Royndir, førleikar | | Tað verður vektað positivt, um viðkomandi ráðgevarar hava førleikar og royndir innan, t.d. hesi <u>*amboð*</u>:<br>• JavaScript,<br>• menning av mobilum appum<br>• .NET og/ella JEE<br>• Servarascripts<br>• C++, Python, PHP, Perl, Groovy ella annað útbreidd programmeringsmál<br>Hesar <u>*metodir og leistar*</u>:<br>• Scrum (e.ø. agilum) arbeiðsháttinum<br>• Continuous integration<br>• Solution architecture<br>• KT-test<br>• Dev-Ops<br>• Skipanarábyrgdari (systemadmin) |
| Organisatión | | Tað verður vektað positivt, um veitarin hevur ein vælskipaða organisatión, har tað m.a. ber til at skifta út ráðgevar, um tað skuldi verið neyðugt. |
| Útbúgving | | Tað verður vektað positivt, um ráðgevararnir hava útbúgving innan software, t.d. KT-verkfrøði, teldufrøði, datamatikara ella líknandi. |
| **Prísur:** | 50 % | |
| Miðal tímaprísur | | Samsýningin fyri veitingar fevndar av hesum útboði, skal grundast á ein fastan miðal tímaprís fyri teir 2-3 ráðgevarnar. |

**Útrokningin fer fram á henda hátt:**

Førleikar, útbúgving og royndir hjá ráðgevum:

Út frá einari samlaðari meting - út frá førleikum, útbúgving og royndum hjá teimum 2-3 ráðgevunum - verður eitt stigatal á einum skala frá 1-50 givið, har 50 er hægsta stigatal.

Tímaprísur

Tilboðið við lægsta samlaða tímaprísi fær 50 stig.

Hini tilboðini fáa ásett eitt stigatal eftir hesum frymli:

*Tilboð við lægsta tímaprísi/tímaprísur í tilboði ið skal metast x 50*

Lægsti tímaprísurin í frymlinum kann aldrin verða lægri enn 500 kr., tvs. at bjóðar ein veitari við einum tímaprís lægri enn 500 kr. verður tímaprísurin ásettur til 500 kr. í vektingini.

**Dømi um útrokning:**

*Góðska*

Tilboð 1: Hesin veitarin skorar lægst, tí ráðgevararnir hava fáar og ikki so relevantar royndir og førleikar, ikki hava relevanta útbúgving, og tí veitarin hevur eina veika organisatión. **Hesin fær 20 stig**.

Tilboð 2: Hesin veitarin skorar miðal, tí royndir, førleikar, útbúgving og organisatión er á einum miðalgóðum stigi. **Hesin fær 35 stig**.

Tilboð 3: Hesin veitarin skorar hægst, tí ráðgevararnir hava tær bestu og drúgvastu royndirnar, førleikarnir, útbúgvingina og ta sterkastu organisatiónina. **Hesin fær 50 stig**.

*Prísur*

Tilboð 1: Tilboðið við lægsta miðaltímaprísi hjá veitaranum er 500 kr. Hetta gevur 50 stig.

Tilboð 2: Næstlægsta tilboðið er 650 kr. Hetta gevur 500/650 x 50 = 38,5 stig

Tilboð 3: Triðlægsta tilboðið er 800 kr. Hetta gevur 500/800 x 50 = 31,5 stig

Samlað meting

Tilboð 1: Førleikar 20 stig + miðaltímaprís 50 stig = samlað meting á 70 stig.

Tilboð 2: Førleikar 35 stig + miðaltímaprís 38,5 stig = samlað meting á 73,5 stig.

Tilboð 3: Førleikar 50 stig + miðaltímaprís 31,5 stig = samlað meting á 81,5 stig. **Hesin veitarin gerst sostatt vinnari av útboðnum**.

## 8. Innlating og tíðarætlan

| Dagfesting | Hending | Viðmerking |
|---|---|---|
| 6. mai | Tilfar lagt út á Keypsportalin | www.keypsportal.fo |
| 14. mai | Freist hjá veitarum at seta spurningar um útboðstilfarið | Spurningar skulu verða skrivligir og sendast til lilly@talgildu.fo í seinasta lagi kl. 13 tann 14. Mai.<br>Spurningar verða svaraðir leypandi og í seinasta lagi kl. 16 tann 15. Mai.<br>Skjal við svarunum til spurningarnar verður lagt á Keypsportalin |
| 21. mai | Freist at lata inn tilboð upp á veitingina er 21. mai 2018 kl. 13:00 | Tilboðið skal latast inn umvegis teldupost til talgildu@talgildu.fo.<br>Tilboð, ið verða móttikin eftir freistina, verða ikki viðgjørd. |
| 23. mai | Sáttmálaundirskrift | Í døgunum 21-23 mai verður sáttmálin viðgjørdur og undirskrivaður |
| 24. mai | Vinnandi tilboð kunngjørt | www.keypsportal.fo |